## Konsertferð við rúkandi ferð

Tríggir rapparar: ein amerikumaður, ein kubanari og ein úr dominikanska lýðveldinum, allir búsitandi í Danmark, og allir rapparar, hetta er uppskriftin uppá KNA-connected, og uppskriftin riggar, við nummar eitt hitti og framførslum um alt Danmark, hevur bólkurin vunnið sær nógvar fjepparar. Leygarkvøldið spælir bólkurin í Føroyum. Tvær konsertir eru á skránni, og tað er longu greitt, at talan ikki verður um langar framførslur. Bólkurin fer á pall í Mentanarhúsinum í Fuglafirði klokkan hálvgum tvey og longu klokkan trý trína teir á pall í Eclipse í Havn.



## Liljan stjórnar í Vágum

Nevndin í Vága Fólkafloksfelag hevur skipað seg í vikuni. Tað var einmælt samtykt at velja Liljuna Jacobsen úr Miðvági til forkvinnu. Hon verður samstundis limur í landsleiðslu floksins. Fyrsta tiltak, nýggja forkvinna fer at skipa fyri, verður fundur, har ting- og landsstýrismanning floksins luttaka. Hetta verður ikki fundur, har politikararnir fara at greiða frá sínari støðu, men har fundarfólkið fer at siga politikarunum sína hugsan. – Røddir hava verið frammi um, at kvinnur ikki sleppa framat í Fólkaflokkinum, men hetta er ikki so. Tað er bara at halda seg framat, sigur Liljan Jacobsen.

# Vilja innflyta útfluttar prentlutir

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður tendraði í gjár eina nýggja og sera framkomna prentmaskinu hjá Føroyaprent í Havn, sum ætlar at fáa fatur á tí prentarbeiði, sum føroyingar senda uttanlands**

PRENTSMIÐJA
*Eirikur Lindenskov*
eirikur@sosialurin.fo

Fyri trimum árum síðani løgdu Dimmalætting og Hestprent prentsmiðjurnar saman og stovnaðu í felag prentsmiðjuna Føroyaprent. Síðani tá er prentsmiðja støðugt útbygd, og í gjár var tann nýggjasta maskinan tikin í nýtslu.

Jon Hestoy, stjóri á Føroyaprent, sigur, at hendan íløgan fer at gera prentsmiðjuna føra fyri at kappast á jøvnum føti við allar prentsmiðjur í grannalondunum.

Talan er um eina maskinu frá Heidelbergverksmiðjuni.

- Hon hevur alla útgerð, ið hugsast kann, og vit vænta, at hon kann framleiða dupult so nógv sum tær báðar maskinurnar, sum vit hava vrakað, sigur Jon Hestoy.

Maskinan eitur Heidelberg SM74, og hon kann prenta í fimm litum og kann prenta 15.000 ørk um tíman.

Ætlanin hjá Føroyaprent er at koyra maskinuna í tveimum vaktarskiftum.

Føroyaprent leggur seg fyrst og fremst eftira t fáa fatur í prentið, sum verður prentað uttanlands, sigur Jon Hestoy. Hann vísir á, at so leingi, sum so stórur partur av føroyskum prentlutum verður prentaður uttanlands, er ikki neyðugt at tosa um útflutning av prentlutum – tí møguleikarnir fyri vøkstri eru stórir, bara tey fáa fatur á føroyskum prentlutum.

Tað var Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum á samkomu seinnapartin í gjár fekk heiðurin at tendra maskinuna – og fyrsti prentluturin var ein plakat hjá Edward Fuglø, "Manmade".

Jon Hestoy var sum sera fegin um nýggju útbyggingina. Hann takkaði øllum starvsfólkunum, sum eru størsta aktivið hjá Føroyaprenti, kundum og øllum Føroya fólki, - ið lesur og nýtir tað, ið vit prenta, segði Jon Hestoy.



*Jon Hestoy, stjóri á Føroyaprenta bíða spentur, meðan Jóannes Eidesgaard tendrar nýggju fimmfarvaðu Heidelberg prentmaskinuna, ið er ein kollvelting í føroyska prentsmiðjuheiminum*

*Myndir: Edith Johannesen*



*Jon Hestoy, stjóri á Føroyaprenti, Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Edward Fuglø, listamaður, sum hevur gjørt fyrsta prentlutin, sum varð prentaður við nýggju prentmaskinuni hjá Føroyaprenti í gár*



*Jon Hestoy saman við góðum gomlu dimmumonnum: Benny Samuelsen, Flemming Samuelsen og Hjalgrim Samuelsen*